# TWR Kvinnur við Vón

## Bønaráheitanir – mai 2023

1. Gud, lat tey, ið lurta eftir *Kvinnur við Vón* sendingunum í Kambodja, geva sær tíð og rúm í lívi sínum at koma nærri Tær og orði Tínum og lurta, so Tú kanst leiða tey. (Sálmur 32:8)
2. Harri, broyt hjørtu og sinni teirra í Kina, ið ikki virða kvinnur. Reis upp leiðarar, ið kunnu fáa ein enda á ágangi í heimunum og harðskapi móti kvinnum. (Esaias 60:18)
3. Harri, nøkta tørvin hjá einkjum í India, ið hava mist menn sínar av koronu farsóttini, og sum onga inntøku hava, so tær kunnu fostra upp børn síni og geva teimum frálæru. (Filippibr. 4:19)
4. Himmalski Faðir, takk, at yvir 80 útvarpsstøðir í Indonesia og Java senda *Kvinnur við Vón* sendingar á teirra máli (Sálmur 71:8)
5. Harri, vit biðja, at fólk allastaðn**i** í Japan kunnu hoyra og taka ímóti evangeliska boðskapinum. Lat tey, ið sita í myrkri, taka ímóti frelsu í Jesusi (Esaias 9:2)
6. Faðir, lat tannáringar í Korea, ið eru strongdir av harðari kapping og ágangi í skúlunum, finna hvíld, gleði og frælsi í Tær. (Jóhannesar Ev. 8:32)
7. Gud, nógv fólk í Mongolia hava vánaliga heilsu av luftdálking, serstakliga børnini. Lat tey øll verða grødd í Jesu navni. (Jeremias 33:6)
8. Faðir, lat kvinnur á Filipsoyggjunum, ið mugu leita út í skøkjulevnað til tess at vinna til dagligt breyð, finna hóskandi arbeiði, og lat tær skilja sítt sanna virði í Tær. (Jeremias 29:11)
9. Lat kvinnur í Nepal, ið lurta eftir *Kvinnur við Vón* sendingum, meðan tær læra at seyma og lesa og annað, koma at kenna Jesus, samstundis sum tær læra, hvussu tær kunnu hjálpa familjuni peningiliga. (Jóhannesar Ev. 17:3)
10. Faðir, lat børn í Vjetnam, ið vaksa upp í heimum, ið ikki virka væl, fáa meiri umsorgan og eitt mennandi umhvørvi frá foreldrum sínum. (Efesusbr. 6:4)
11. Harri, vit prísa Tær, at Tú hevur leitt TWR Kvinnur við Vón toymið í Kambodja gjøgnum nógvar trupulleikar, og at Tú hevur givið teimum troyst og styrki til ikki at gevast. (Filippibr. 4:13)
12. Vit prísa Tær, Gud, at Tú hevur útvegað ein nýggjan programmleiðara til kinesisku *Kvinnur við Vón* sendingarnar á uyghur máli! Hjálp honum skjótt at fáa neyðugu førleikarnar. (Orðtøkini 4.11)
13. Almáttugi Gud, vit biðja Teg um at hjálpa konunum í Maharashtra, India, ið eru sviknar av monnum sínum, og ikki hava rættarligan ella fíggjarligan stuðul. (Esaias 41:10)
14. Harri, hjálp toymi okkara í Indonesia at fáa fíggjarligan stuðul á staðnum, so tey kunnu halda á og tæna lurtarunum á ein inniligari hátt. (2. Korintbræv 9:8)
15. Gud, vilt Tú leggja japanska fólkinum á sinni at lurta eftir *Kvinnur við Vón* sendingunum, at taka ímóti kærleika og fyrigeving frá Tær, og at luttaka í forbøn við at nýta mánaðarligu bønarkalendararnar. (Esaias 52:7)
16. Faðir**,** lat upp m**ø**rkini til Norðurkorea á víðan vegg, og at radiotól aftur kunnu fáast til vega, og trúartænastan kann takast uppaftur eftir korona-stongsulin. (Efesusbr. 2:14)
17. Harri, vit líta á, at vit, í tíð Tíni, skjótt kunnu senda *Kvinnur við Vón* sendingar til Mongolia at bera kvinnunum har troyst og leiða tær til eitt ríkt lív í Jesusi. (Sálmur 16:11)
18. Gud, lat tey, ið ikki hava útvarpstól ella eru á plássum, har okkara útvarps - sendistøðir ikki røkka, finna og lurta eftir *Kvinnur við Vón* sendingum okkara á filipinsku heimasíðuni hjá TWR. (Ezekiel 3:10)

19. Mong í Nepal, ið eru í fíggjarligum vónloysi, halda, at lívið er ikki vert at liva. Harri, forða fyri, at fólk beina fyri sær, og hjálp teimum at finna meining í lívinum gjøgnum Teg. (Jóhannesar Ev. 6:35)
20. Gud, ger ein útveg, so at trúboðanar- og evangeliskt virksemi framvegis kann fara fram og gera mun í Vjetnam, hóast ein lóg er gjørd, ið setir forboð fyri tí . Lat orð Títt og kærleika Tín náa fólkið har. (2. Timoteusbræv 2:9)
21. Faðir, troysta og grøð hjørtuni á familjum, ið hvønn dag missa onkran í ferðsluvanlukku í Kambodja. Bein burtur mutur og falsan, og lat tey, ið verða órættvíst viðfarin fáa sín rætt. (Orðtøkini 21:15)
22. Harri, gev leiðarum í Kina vilja og vísdóm til at fáa ein enda á kynsligum menniskjahandli har. Lat lógir verða smíðaðar og settar í gildi og verða útintar til at forða fyri slíkum handli, so at offrini koma í frælsi og verða grødd gjøgnum Teg. (Sálmur 72:14)
23. Himmalski Faðir, vit biðja, at kvinnur í bygdarøkjum í India kunnu fáa dygga heilsukanning og **-**viðgerð og hava góða heilsu í viðgongutíðini og tryggan barnsburð. (2. Mósebók 15:26)
24. Gud, tað eru milliónir av kvinnum í Indonesia, ið ikki trúgva á Jesus sum Frelsara og Harra. Leið tær til Tín. (Ápostlasøgan 4:12)
25. Harri, vit biðja, at starvsfólkini hjá TWR Kvinnur við Vón í Japan verða fylt við Heilaga Andanum, **so** tey fáa kraft at tæna við vísdómi, náði og gleði. (Esaias 60:1)
26. Faðir, lat tey 34.000 norðurkoreansku flóttafólkini í Suðurkorea hoyra evangeliska boðskapin og taka ímóti Jesusi Kristi sum Frelsara sínum. (Efesusbr. 1:13)
27. Gud, gev stjórnarlimunum í Mongolia vísdóm, til at vita, hvussu almenni peningurin skal nýtast á bestan hátt til gagn fyri fólkið. (1. Timoteusbræv 6:9-10)
28. Harri, lat tey, ið lurta eftir *Kvinnur við Vón* sendingum á cebuano, ilocano og tagalog tungumálunum finna styrki, vísdóm hjá Tær og inniligt samfelag við teg. (Esaias 55:11)
29. Fleiri, ið lurta eftir *Kvinnur við Vón* sendingum í Nepal, hava eitt ynski at koma í onkra samkomu, men tær mugu fáa loyvi frá monnum sínum. Harri, nem hjørtuni á monnum teirra at stuðla konunum og taka ímóti Tær. (Ezekiel 11:19)
30. Faðir, varðveit tannáringar í Kina, nú ótti er komin á tey av tíðindunum um, at fleiri ung fólk eru horvin. Gev familjum, ið stúra, Tín frið. (2. Tessalonikubræv 3:3)
31. Faðir, lat mammur í Singapore, ið arbeiða og stríðast við at finna javnvág ímillum starv og familju, finna sanna hvíld og frið í Tær í strembanini at vinna nóg mikið av peningi til høga livikostnaðin. (Matteusar Ev. 11:28-30)

**”Høvuðsstuðulin undir øllum kristiligum arbeiði er bøn”** **(Eeva Vähäsarja)**

**Frá Peggy Banks, í leiðarastarvi hjá felagsskapi fyri forfylgd:**

**Eg eri tilreiðar at svara, um tit hava nakrar spurningar. pbanks@twr.org**

# Heilsan frá Susie Pek Altjóða leiðara
# TWR Kvinnur við vón

Kæru vinir.

Nú eg fari undir hesa føgru ferð at taka mær av TWR Kvinnur við Vón trúðartænastuni og leiða hana inn í framtíðina, hyggi eg aftureftir og grundi á allar tær leiðir, Harrin hevur ført meg á. Eg hugsi, um tykkum dámar at gera tað sama, tá ið broytingar koma á leiðina. Tá ið vit rannsaka fortíð okkara, læra vit um okkum sjálvi og geva broytingunum í lívi okkara gætur; síðani hava vit ein frálíkan møguleika at taka nýggj val. Tað besta av øllum er, at vit verða mint á góðsku og trúfesti Harrans.

Nakrar dagar áðrenn eg fór undir hetta nýggja tíðarskeiðið, var ein støða, ið førdi meg aftur til tíðina, tá ið eg av fyrstantíð kom at kenna Harran. Stutta frágreiðingin av søguni er, at eg vaks upp hjá eini trúgvandi mammu og einum vantrúgvandi pápa. Pápi mín var ongantíð ímóti teimum trúgvandi ella kristnari lívsførslu, men hann vildi ikki geva lív sítt til Jesus. Kortini varnaðist eg ikki, at eg heldur ikki vildi.

Eg gekk á møti og royndi at fylgja nøkrum "reglum". Í huga mínum visti eg, at Bíblian var sonn, og at Jesus var Frelsari heimsins, men eg hevði ongantíð givið Honum lív mítt**.** Eg hoyrdi, at fólk søgdu, at Jesus hevði fullkomiliga broytt lív teirra, men satt at siga: Hugsanin um at verða umbroytt órógvaði meg. Eg helt meg hava tamarhald á mær sjálvari og vildi ikki koma mær í vanda at gerast ein keðiligur persónur.

Tó, "tamarhald" mítt fjaldi væl særdu og pínufullu sálina fyri fólkunum rundan um meg. Lív mítt var umgyrt av fólkum, men enn kendi hjarta mítt ikki kærleika. Hvussu kundi nakar møguliga elska meg? Eg royndi at greiða alt hetta í egnari styrki. Eg hugsaði, at um eg kúgaði minnini um ágang og kensluna av at verða vrakað, fór tað at vera nóg mikið. Men so var ikki.

Hóast eg ikki var greið um tað, so leitaði eg eisini eftir treytaleysum kærleika í øllum sambondum mínum. Mær longdist eftir at verða elskað, viðurkend, virðismett og fáa umsorgan, so eg royndi at liva eitt so gott lív sum gjørligt (soleiðis sum eg skilti tað) fyri mínari familju, vinum, samstarvsfeløgum og dreingjum í teirri vón, at eg kundi vinna kærleika teirra.

Fyrsta árið á lærdum háskúla kom eg í eina støðu, og eg visti, at aftursvar mítt fór at broyta lív mítt. Valið, eg tók, fór antin at leiða meg á eina undursama leið ella eina ræðuliga leið. Innast inni í mær
visti eg, at Kristus var svarið. So at enda yvirgav eg meg og gav lív mítt til Kristus. Frá fyrsta degi av fór ein innilig umbroytingar-tilgongd fram. Fløkjan í lívi mínum hvarv ikki við tað sama; tað tók tíð. Kærleiki Guds hevði nátt meg, men framvegis kundi eg ikki "taka ímóti tí kærleika" til fulnar.

Sum frá leið vísti Harrin í mildleika kærleika Sín til mín ígjøgnum mínar stillu løtur, gjøgnum umstøður og ymisk fólk. Hetta hevur verið ein ferð, har eg áhaldandi havi kunnað tikið ímóti kærleika Hansara, har eg veit, at einans Hann kann fylla tómleikan í hjørtum okkara. Hann elskar meg á slíkan hátt, ið eingin annar kann. Hann elskar teg á sama hátt. Og

kærleiki Hansara ger okkum før fyri at taka ímóti kærleika frá øðrum og at geva øðrum kærleika.

Hóast tað tók mær eina tíð at søkja djúpari inn í Guds kærleika, so broytti hesin kærleiki mína áskoðan á heimin beinanvegin, tá ið eg fekk samband við Hann. Eg hoyrdi fleiri vitnisburðir um, hvørja ávirkan bøn hevði, og ynskti sjálv at royna hetta. Eg ynskti at nema heimin gjøgnum bøn. Sama árið kundi eg ikki halda tárunum aftur, tá ið eg hoyrdi tíðindini um eitt stórt gjøgnumbrot í eini politiskari støðu. Eg hevði biðið um, at ein slík broyting mátti henda!

Hesin sami kærleiki leiddi meg fyri mongum árum síðani at miða eftir og fyrireika meg at fara í trúartænastu. Síðani tá havi eg havt ta æru at tæna í ymsum trúartænastum. Eg minnist væl, tá ið eg á fyrsta sinni hoyrdi um “Project Hannah”, ið var upprunaliga navnið á TWR Kvinnur við Vón. Orðini “samhugi og bøn fyri kvinnum” numu hjarta mítt. Eg hugsaði við mær sjálvari: “Ein dag fari eg at arbeiða fyri handan felagsskapin.” Eg tosaði við mann mín um tað og bað fyri tí. Áleið fimm ár seinni kom eg inn í felagsskapin. Tað hevur av sonnum verið ein undranarverd ferð. Eg eri sera takksom at kunna biðja fyri kvinnum um allan heim. At tala vón til hjørtu teirra. At vísa teimum á Jesus, okkara livandi vón.

Bøn mín og hjartans ynski mítt er, at kvinnur um allan heimin og tvørtur um ættarlið koma at “kenna kærleika Kristusar, sum stígur upp um allan kunnskap – fyri at tit kunnu verða fylt við allari fylling Guds.” (Efesusbr. 3:19)

Í kærleika Frelsara okkara,

Susie

***KVINNUR VIÐ VÓN*** **twrwomenofhope.org**

**Fíggjarstuðul:**
**EvR (Evangeliska Røddin) hevur konto í Betri Banka nr. 9181 000 533 7145**
**til at flyta pening tilskilað til TWR (Trans World Radio). –**
**Allur stuðul, sum kemur inn á hesa konto fer óskerdur til arbeiðið hjá TWR. –**
**TWR PO Box 12, 82002 Bratislava 22 – Slovakia — twre@twr.org**

# Søga um vón  mai/juni 2023

# Vón fyri indiska mammu

Eftir Nikita Paul, samstarvsleiðara TWR India

Um tú komst á tal við vanligar mammur í India, hevði tú ofta hoyrt tær siga, hvussu ovbyrjaðar og undirmettar tær kendu seg. At eingin skilir tær ella leggur í tað, sum teimum tørvar, er ein vanligur hugburður, sum er galdandi millum mammur í sosialu miðlunum.

Við ynski um at bera vón og uggan, hevur *Kvinnur við vón* sjónvarps sendingin á tamilskum máli orðaskifti um tey evni, sum mammur alsamt stríðast við. Og tey aftursvar, sum tey fáa frá hesum orðaskiftunum, hava av sonnum verið stimbrandi.

Lívið hjá Prabavathy* varð umbroytt, tá hon hugdi eftir okkara sending, sum var um eina familju við einum barni, sum bar brek. Søgan segði frá einari mammu, sum skilti, hvat ið hennara barn stríddist við, og sum arbeiddi fyri at stimbra tað á teimum økjum, har tað var ført fyri at mennast. Barnið, sum varnaðist hennara kærleika, vísti sínámillum kenslur og svaraði aftur til hennara royndir at hjálpa tí.

Prabavathy, sum sjálv er mamma at einum brekaðum barni, var rørd at síggja, hvussu søgan á veruligan hátt lýsti máttloysi og tunglyndi av ikki at vita, hvussu hon skuldi taka sær av barninum. Sendingin eggjaði henni til ikki at sleppa vónini og at søkja Guds hjálp til at kenna rætta háttalagið fyri hana til at koma í samband við og stimbra sítt barn. Hon tosaði við okkara starvsfólk, sum høvdu samband við lurtarar og hyggjarar og takkaði teimum fyri at vera Guds svar til sína familju, sum stríddist og strevaðist.

Somuleiðis fann Saridha* vón í Gudi gjøgnum okkara sending, sum segði frá einari kvinnu, sum ikki var før fyri at fáa eitt barn. Saridha var ørkymlað og harðrend móti sínum starvsfeløgum, við tað at flestu samtalurnar hjá teimum snúðu seg um teirra børn. Hon misti vónina, og hennara kenslur flutu yvir á heilsuskaðiligan hátt.

Men hennara samrøður við okkara starvsfólk í sendingini gjørdist útvegurin, sum henni tørvaði fyri sína pínu. Meðan tey ráðgóvu og bóðu saman við henni, gleddist Saridha og fekk endurnýggjaða kenslu um vón fyri sína framtíð.

Kvinnur í India hava avmarkaða atgongd til at fáa guddómliga hjálp í sínum dagliga gerandisliga stríði og strevi.

Biðið inniliga um, at TWR *Kvinnur við vón* trúartænastan fer at halda fram at vera teirra vegur til andaliga ríkt, meiningsfult lív.

*Nøvnini broytt av trygdarávum